# Lastin hjá Krúnborg hildnaðist væl

**Týsmorgunin vóru 3.000 tons komin upp úr skipinum, og tá var framvegis fiskur eftir í lastini. – Eg vænti tí-skil, at útrokningar-nar, sum siga, at skip-ið nú lastar 3.200 tons, fara at halda, sigur reiðarin**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Mánamorgun er, og Krúnborg er komin á Fuglafjørð við størstu svartkjaftalastini, sum nakrantíð er løgd upp í Føroyum*
*Mynd: Yngve Olsen, Havsbrún*

Í blaðnum í gjár skrivaðu vit, at Krúnborg var komin á Fuglafjørð mánamorgun-in við størstu lastini av svartkjafti, sum nakrantíð er landað í Føroyum og helst her norðuri í Atlants-havinum yvirhøvur.

Eftir at skipið í fjør heyst varð longt við sløkum 8 metrum, søgdu útrokning-ar, at Krúnborg nú lastar 3.200 tons, tá ið lastin er full.

Í samrøðu í gjár, segði Petur H. Jacobsen, reiðari, at hetta er fyrsti túrurin síð-an leingjanina, at skipið hevur fulla last.

– Vit hava frætt úr Fugla-firði í morgun. Teir eru ikki lidnir at landa enn, men upp eru komin 3.000 tons.

Petur segði í gjáramorg-unin, at teir framvegis bíða spentir eftir, hvussu stór lastin verður, tá ið alt er komið upp.

– Eg vænti tískil, at út-rokningarnar, sum siga, at skipið nú lastar 3.200 tons, fara at halda.

Krúnborg er nú 82,05 metrar long og 14 metrar breið, og fyri leingjanina lastaði skipið 2.500 tons.

Leingjanin, sum póllend-ingar stóðu fyri, kostaði reiðarínum einar 7 miljónir krónur.

## Avstað aftur

Ætlandi fór Krúnborg av-stað aftur so skjótt, sum all-ur fiskurin var komin upp úr skipinum. Teir fara aftur á leiðina suður úr Írlandi at royna. Hetta er ES-sjógvur, og seinastu tíðina hevur svartkjaftafiskiskapurin á leiðini verið góður.

Skipari á seinasta túri var Pauli Wang av Glyvrum. Sámal Jacobsen, sonur Eiler, plagar at føra skipið, og ein annar avloysari sum skipari er Tórstein Petersen, sum býr í Vestmanna.

Sonur Eiler Jacobsen, 29 ára gamli Eiler Jacobsen, er ein av stýrimonnunum um-borð á Krúnborg.

Kongaliga vitjanin í summar:

# Ætlandi fara kongshjúnini at vitja víða um

**– Enn er endaliga skráin fyri vitjanina ikki løgd, men miðjað verður eftir, at tey fýra skulu koma so víða um landið, sum stundir og møguleik-ar nú einaferð verða til, sigur Dan Knud-sen, sum starvast á Ríkisumboðnum**

KONGALIG VITJAN

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Verður tað, sum Ríkisumboðið ætlar, er hugsandi, at Fríðrikkur krúnprinsur og Mary prinsessa fara at vitja ymsastaðni í Føroyum í døgunum, 20.-23. juni. Við í fylginum verða eisini Margretha drotning og Hendrikkur prinsur*

Enn er endaliga skráin yvir kongaligu vitjanina í Føroy-um, 20.-23. juni, ikki løgd.

Tað er Ríkisumboðið, sum saman við danska kongshúsinum og lands-stýrinum leggur skránna.

Á Ríkisumboðnum upp-lýsir Dan Knudsen, at tey framvegis arbeiða við skránni, men at hetta arbeiði ikki er liðugt enn.

Spurdur um nøkur ávís støð á vitjanini eru fastløgd, sigur hann, at arbeitt verður við ymiskum møguleikum, men fyrr enn skráin enda-liga er komin upp á pláss, kunnu tey ikki siga nakað ítøkiligt um skránna.

## Vitja um landið

– Vit kunnu tó siga so mik-ið, at miðjað verður eftir, at tey fýra, Margretha drotn-ing, Hendrikkur prinsur, Fríðrikkur krúnprisur og Mary prinsessa, koma so víða um landið, sum stund-ir og møguleikar nú eina-ferð verða til.

Dan Knudsen sigur, at kongaskipið kemur higar til lands, meðan tey kongaligu vitja, men hann væntar, at Margretha, Hendrikkur, Fríðrikkur og Mary koma og fara avstað aftur við flogfari.

– Tað tekur langa tíð at sigla upp til Føroya og nið-ur aftur til Danmarkar, og tí er ikki hugsandi, at tey kongaligu hava stundir at ferðast sjóvegis, sigur hann.

Kongaliga vitjanin í Før-oyum verður sum nevnt í døgunum, 20.-23. juni.

# Nýggj KT-fyritøka í Eysturoy

**Kári Sigvardsen hevur stovnað KT-fyritøkuna, 7bit, sum húsast í Saltangará**

KT-VINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ein nýggj KT-fyritøka hevur latið skrivstovu upp í Saltangará. Tað er Kári Sigvardsen, sum er stovn-ari av fyritøkuni, ið hevur fingið navnið, 7bit.

– Okkara heimstaður er í Runavíkar kommunu, men vit veita KT-tænastur um alt landið.

Stovnarin sigur, at flestu tænastur, sum felagið veitir, eru málrættaðar vinnuni, feløgum og stovnum.

– Men vit hjálpa eisini privatfólki við umvæling-um, vegleiðing og keypi.

Kári sigur, at starvsfólk-ini hjá 7bit hava útbúgv-ing og royndir innan KT og televinnuna.

– Røtt og álítandi ráð-geving vantar mangan í hesi enn nýggju og lítið siðbundnu, men støðugt mennandi vinnu. Okkara mál er at vera hin álítandi og skilagóði KT-sam-starvsfelagin, sigur Kári.

Stovnarin sigur, at 7bit leggur dent á at røkka øll-um uppgávum innan teirra kjarnutænastu til fulnar.

– Vit vilja fegnir sam-starva við aðrar veitarar um tað, sum liggur uttan-fyri okkara kjarnutænastu, sigur Kári Sigvardsen.

Skrivstovan hjá 7bit er á Heiðavegi 32 í Saltang-ará, nevniliga í ovaru hæddini í bygninginum hjá El-tænastuni.

7bit hevur heimasíðu, sum kann lesast á www.7bit.fo



*Kári Sigvardsen er stovn-arin av nýggju KT-fyritøk-uni í Saltangará, 7bit*